


# Fløga við vísum av Bryggjubakka

Í dag kemur forkunnug tvífløga út við táttum og vísum av Bryggjubakka. Á útgávuni syngja nakrir av okkara bestu táttasangarum ella -kvøðarum 41 føroyskar tættir og vísur.

Upptøkurnar eru frá ymsum undirhaldssendingum í Útvarpi Føroya, nevnast kunnu Leygarkvøld á Bryggjubakka, Studentakabarettin frá 1957, Leypársmessa, Lippukassin, Bókadagshald. Harafturat koma ymsar ólavsøkusendingar.

Millum tey, sum syngja ella kvøða, eru Martin Tórgarð, Bjarni Mohr, Oskar Hermansson, Tummas Napoleon Djurhuus, Hans Thomsen, Hermann Jacobsen, Eyðun Johannesen og brøðurnir Eilif og Flemming Samuelsen.

- Leingi hevur verið sóknast eftir føroyskari kjakmentan, og hálærdir granskarar eru komnir til ta niðurstøðu, at hon finst ikki. Men her eru 41 frálík dømi um føroyska kjakmentan, siga útgevararnir.

- Henda skaldskapargrein er so óheft, frí, rúmlig, vælkend og samstundis undirmett av teimum ráðandi, at kjakhugaðir og atfinningarsamir føroyingar hava valt at nýta hana til samfelags-, mentanar- og virðiskjak. Teir vistu, at fjøldin í Føroyum heldur vil hoyra ein góðan tátt enn lesa eina álvarsama blaðgrein. Tað er jú eisini so, at blaðgreinin verður sjáldan lisin meir enn ta einu ferðina, men hvussu ofta verður ikki ein góður táttur sungin ella kvøðin.

Fløguhúsan hevur Sára Finsdóttir gjørt, Tórður Johannesarson hevur lagt tilfarið til rættis, Finnur Hansen hevur ljóðviðgjørt, Súni Selfoss hevur talgildað, og forlagið Glint gevur út. Fløgan kostar 169 kr.

# G! roynt seg í skónum hjá Summarfestivalinum

**- Vit hava helst lært av hesum festivalinum, at vit frameftir skulu verða betri mannað til illveður, sigur Jón Tyril, fyriskipari av G! Festivalinum. Hann er tó nøgdur við, hvussu festivalurin við teimum 6000 gestunum spældi av**

Barbara Holm



Hóskvøldið á G! var einki minni enn ein katastrofa, tá ið stormur og regn herjaði í Gøtu, og Stóri Pallurin mátti takast niður, og framførslurnar útsetast. Hóast hóskvøldið gav øllum gestunum og fyrireikarunum eitt slag frammaná, so gekk kortini sum ætlað fríggjakvøldið og leygarkvøldið, og allar tær stóru konsertirnar vóru hildnar sum ætlað.

Jón Tyril, ein av fyrireikarunum av G! Festivalinum, er í dag sera móður, og situr eftir við einari góðari kenslu av ársins G! Festvali.

- Eftir umstøðunum haldi eg, at vit kunnu ikki annað enn verða nøgd. Stormurin tók nakað hart hóskvøldið, men vit megnaðu kortini at halda stand, sigur Jón Tyril.

## Álitið á G! vaksið

2007 var árið, har G! Festivalurin ikki hekk saman fíggjarliga, og árið eftir bjóðaði so til G! Mini. Úrslitið av hesum hevur millum annað verið, at eitt í fjør vóru bert umleið 4000 fólk á G!, men í ár vóru áleið 6000 fólk.

- Vit eru øgiliga væl nøgd við, at 6000 fólk vóru á G!. Tað tekur tíð at uppbyggja álitið millum føroyingar aftur á G! Festivalin, og hetta vísir, at tað gongur rætta vegin, sigur Jón Tyril.

Hetta merkir eisini, at G! Festivalurin í ár hevur størri fíggjarligt rásarúm.

- Vit hava onga endaliga uppgerð, men vit hava góðar vónir fyri at fáa endarnir at røkka saman í ár, sigur Jón Tyril.

## Betri fyrireikað til storm

G! veður er næstan vorðið eitt hugtak, og tað kemst ikki av ongum. Á nærum hvørjum ári á G! hevur veðrið verið framúr, og fyrireikararnir mugu sigast at ikki hava stórvegis royndir við illveðri, sum eitt nú fyrireikararnir av Summarfestivalurin hava roynt nakrar ferðir.

- Nú hava vit roynt at gingið í skónum hjá fyrireikarunum av Summarfestivalinum, sigur Jón Tyril.

Hóast mest sum alt spældi væl av, so heldur Jón Tyril, at tey framyvir fara at verða betri fyrireikað til illveður av hesum slag.

- Vit hava helst lært av hesum festivalinum, at vit frameftir skulu verða betri mannað til illveður, sigur Jón Tyril.

Tá ið Stóri pallurin var niðurtikin, og allar framførslurnar fluttar á Spælipláss, ávirkaði tað eisini tøknina, og til nakrar konsertir var ljóðið alt annað enn gott.

- Tøkningarnir, sum høvdu ábyrgd av Spæliplássinum, høvdu ikki fyrireikað seg til at hýsa eitt nú Eivør, Týr og Nephew, og tí var ljóðið til summar framførslurnar ikki nóg væl fyrireikað, sigur Jón Tyril.

Hóast hóskvøldið var illa merkt av storminum, so var tað kortini gott fyri mótið hjá fyrireikarunum, at tónleikur fótaði sær kortini.

- Tað hevði helst verið meira kaos, um vit avlýstu konsertirnar hóskvøldið. Vit og helst gestirnir við høvdu mist mótið, um eingin tónleikur var hóskvøldið, sigur Jón Tyril.

Einki er endaligt við fíggjarligur støðuni, og eingin eftirmetingarfundur hevur verið, men Jón Tyril slær fast, at G! 2011 avgjørt verður til veruleika.

*barbara@sosialurin.fo*